# Uganda tosar aftur um Sivic



Nú røkist aftur fyri, at Tomislav Sivic fær kjansin sum landsliðsvenjari hjá Uganda Fyri tveimum árum síðani hildu tey flestu, at fyrrverandi VB-, B36- og KÍ-venjarin, Tomislav Sivic, skuldi venja Uganda. Ta ferðina dróg Sivic sjálvur tó í land, tí hann ikki helt fótbóltssambandið í Uganda halda tað, sum varð lovað. Nú er Sivic tó aftur upp á tal sum landsliðsvenjari. Laszlo Csaba, sum hevur verið venjari, er farin í annað starv, og í lokalu miðlunum verður sagt, at talan nú er um kapprenning millum Tomislav Sivic og landsmann hansara Micho Sredojevic. Tomislav Sivic var í fjør ávegis til VB/Sumba, men sjúka í familjuni gjørdi tó, at hann valdi at vera heima hjá foreldrunum eina tíð.

# Ferguson kom við hugskotinum

Tað var fyrrverandi høvuðsvenjarin hjá Aberdeen, Sir Alex Ferguson, sum kom við hugskotinum um kappingina Aberdeen International Football Festival, sum hevur verið kærkomin hjá føroysku ungdómslandsliðnum seinnu árini. – Ferguson hevði avgerandi leiklut í at gera altjóða fótbóltskapping í Aberdeen, og hann hevur øll árini síðani stuðlað kappingini. Hann spyr ofta, hvussu tað gongur við kappingini, sigur Gordon Naismith, leiðari fyri AIFF við Evening Express. Sir Alex Ferguson er í Aberdeen í hesum døgum, har venjingardystur hevur verið skipaður millum Aberdeen og Manchester United. Hetta fyri at feiðra liðnum, sum vann UEFA CUP kappingina fyri 25 árum síðan.



*Francis Lee fær gula kortið í landsdysti móti Brasilu í heimsmeistarakappingini í Meksiko 1970, eftir at hann framdi fríspark móti málverjanum Felix*

*Mynd: Polfoto*

Francis Henry Lee:

# Frá fótbó

**Nógvir fulltíðar fótbóltsspælarar hava dugað illa at umstilla seg frá tilveruni sum yrkisleikari. Franny Lee gjørdist ein dugnaligur handilsmaður, men var kortini ein vánaligur formaður fyri Manchester City**

FÓTBÓLTUIR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Francis Henry Lee er føddur í Bolton uttanfyri Manchester 29. apríl í 1944. Í 1959 byrjaði Lee sína fótbóltsyrkisleið í Bolton sum 15 ára gamal. Sum Lee vaks til var øllum greitt, at her var talan um ein framúr góðan álopsleikara. Við tíðini eydnaðist tað honum at fáa 139 dystir fyri Bolton, og skoraði hann 92 mál í hesum 139 dystunum. Hetta førdi til, at stóru grannarnir úr Manchester City vildi gera ein sáttmála við hann. Hetta gjørdist veruleiki í oktober í 1967, og talan gjørdist um ein sáttmála, sum hevði eitt virðið uppá 60.000 bretsk pund, sum var nógv tá á døgum. Longu í sínum næsta dysti fyri Manchester City skoraði Franny Lee tá teir spældu móti Fulham.

## Meistarar í 1968

Tað eydnaðist Lee at vinna enska meistaraheitið longu fyrsta kappingarárið, hann spældi við Manchester City. Venjarin hjá Manchester City, Joe Mercer, nevndi Lee "Tann síðsta brikkin í puslispælinum", og tað skuldi vísa seg at verða júst so.

Hetta kappingarárið togaðist Manchester City við Manchester United um ensku fótbóltstrónuna, og ikki fyrr enn í síðsta umfarinum eydnaðist tað Manchester City at staðfesta enska meistaraheitið.

Talan gjørdist um ein sera dramatiskan dyst móti Newcastle United. City vann dystin 4-3, og skoraði Lee eitt av málunum, sum førdi til at meistaraheitið endaði á Maine Road.

Àrið eftir vann City FA Cup finaluna á Wembley við einum 1-0 finalusigri yvir Leicester City. Neil Young skoraði sigursmálið hjá City.

Í 1970 vann City evropeisku kappingina fyri steypavinnarar. Í finaluni, sum var leikt á táverandi Prater Leikvøllinum í Wien, møtti Manchester City pólska liðnum, Gornik Zarbre. City vann 2-1, og skoraði Lee í finaluni uppá brotsspark.

## Brotssparksmet

Kappingarárið 1971-1972 setti Lee eitt brotssparksmet. Hetta árið skoraði hann 35 mál, 15 av teimum uppá brotsspark, sum er bretskt met fyri brotsspørk, sum ein einstakur fótbóltsspælari hevur skorað í einum kappingarári.

Nógv av brotsspørkunum, sum City fekk tillutað, vóru brotsspørk, sum vóru gjørd ímóti Franny Lee. Hetta gjørdi, at viðhaldsfólkini hjá City góvu honum kelinavnið: "Lee One Pen".

Fótbóltstíðindamenn og onnur meintu, at Lee datt heldur lætt, og at hann fekk ov nógv brotsspørk tillutað. Hesi góvu honum eyðknevnið: "Lee Won Pen". Tvey dømi um hvussu góður og gløggur bretskur humor kann verða.

Tá bretar hava kjakast um teir spælarar, sum "kava" fyri at fáa brotsspørk, so hevur navnið hjá Franny Lee ofta verið uppi og vent. Leiðarin fyri ensku fótbóltsdómarnar, Keith Hackett hevur sagt opið og alment: At Franny Lee bar orð fyri at detta ov lætt.